

Eldar Sætre leggur fram úrslitið fyri fyrsta ársfjórðing í morgun. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Hóast lága oljuprísin er úrslitið hjá Statoil betri enn væntað

**Jógvan Hugo Gardar**

30.04.2015 - 07:35

Oljan.fo

Úrslitið hjá Statoil fyri fyrsta ársfjórðing 2015 varð almannakunngjørt í morgun.

Úrslitið fyri skatt varð 22 milliardir krónur. Flestu greinarar høvdu væntað eitt yvirskot uppá umleið 13 milliardir krónur, og sostatt gjørdist úrslitið nógv betri enn væntað. Men í mun til sama ársfjórðing i 2014, so er úrslitið nógv tódna. Tá var yvirskotið áðrenn skatt 46 milliardir nordkar krónur.

Tað var í stásiligu hølunum hjá felagnum á Fornebu í Oslo, at leiðslan legði fram úrslitið í morgun. Prísurin á olju er fallin sera nógv síðani síðsta summar, og hetta hevur havt við sær, at vinnan sum heild hevur havt tað trupult. Tað sást eisini aftur í framløguni í morgun. Statoil legði stóra herðsla á, at effektiviteturin mátti betrast í vinnuni. Statoil fór í gongd við at effektivisera væl áðrenn oljuprísurin fór at falla, og tí vísti leiðslan á, at

tað er komi væl áleiðis við at fáa meira burtur úr hvørji krónu, sum verður brúkt. Men hetta arbeiði heldur fram, og vit kunnu framvegis vænta stórar broytingar í vinnuni.

Tá ymsu tillagingarnar eru tiknar burtur, so gerst undirskotið 35,4 milliardir krónur. Eldar Sætre, aðalstjóri í Statoil, vísir á at orsøkin til hetta eru stóru niðurskrivingarnar í fyritøkuni. Til samans hevur Statoil skrivað niður virðir fyri 46,1 milliardir norskar krónur. Meginparturin av hesum er frá skiferoljuframleiðsluni í USA. Í Norður-Amerika eru niðurskrivingar gjørdar fyri umleið 30 milliardir krónur.

Eldar Sætre sigur at hóast oljuprísurin hevur verið niðanfyri 50 dollarar, so megnar Statoil at hava ein rakstur sum er góður, og at leiðslan heldur fram at tillaga raksturin til tann oljuprísin vit hava í dag.